# Fundur í Hvalbiar sóknar kommunu hin 14. okt. 2010

Møtt vóru: Otto West, Trygvi Midjord, Martin í Nesi, Niels Olaf Eyvindsson, Herdis Jensen, Rúni Thomsen og Niels J. Thomsen.

Fundurin varð settur kl. 18.05.

1. **Umsókn um stuðul til prenting av blaðnum ”Eftirskúlin nr. 6”.**
   Samtykt varð at stuðla hesum við kr. 2.000,-.

2. **Skriv frá Vatnsýnisnevndini um vatn, sum rennur inn í kjallara.**
   Niðurstøðan hjá Vatnsýnisnevndini var, at hetta má vera ein kommunal uppgáva, tá kloakkin liggur út í ánna. Samtykt varð at Tekniska nevnd tekur sær av málinum.

3. **Skriv frá Búnaðarstovuni viðv. matr. nr. 128n til ummælis/viðmerkingar.**
   Samtykt varð at viðmæla, at byggifreistin verður útsett í nøkur ár aftrat.

4. **Umsókn um loyvi til at byggja neyst á matr. nr. 352 og 353.**
   Samtykt varð, at Tekniska nevnd fer á staðið og kannar málið.

5. **Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 142b í Hvalba.**
   Samtykt varð at viðmæla sundurbýti, men viðvíkjandi almenna vegnum varð samtykt, at Vega- og Havnanevndin skal kanna, hvussu hetta skal loysast.

6. **Skriv frá bátaeigarum viðv. bátahyli.**
   Vega- og Havnanevndin upplýsti, at kanningar eru í gongd hjá Landsbyggifelagnum og verða hesar væntandi lidnar síðst í nov. Samtykt varð at taka ein fund við bátaeigararnar, tá kanningarnar eru lidnar.

   (Áðrenn næsta mál varð viðgjørt, fór Rúni Thomsen av fundinum vegna ógegni).

7. **Umsókn frá Hvalbiar Sóknar Orkufelag.**
   Samtykt varð at boða teimum frá, at teir mugu royna aðrar møguleikar til fíggjarligan stuðul fyrst. Um tað ikki eydnast at fáa nóg mikið av fígging á henda hátt, kann møguleikin standa opin fyri, at kommunan luttekur við einum parti av kostnaðinum.

8. **Rokn. fyri eykaarbeiði á Sambýlinum.**
   Í sambandi við gerð av nýggjum duri á vestursíðuni og at leggja tróðurplátur við sveisipapp á alla vestursíðuna á tekjuni v.m., hevur Hvalbiar Kommuna móttikið eyka rokning uppá arbeiðsløn og tilfar. Samtykt varð at játta eykarokningina.

(Áðrenn mál nr. 9 kom fyri, fór Niels Olaf Eyvindsson av fundinum vegna ógegni.)

**9. Fyrispurningur/uppskot viðv. matr. nr. 39a – Nesvegur og í Støðini.**

Skriv frá Martin í Nesi, har víst verður á ampar í ferðsluni á svinginum Nesvegur og í Støðini. Samtykt varð, at Martin í Nesi arbeiðir víðari við málinum.

**10. Umsókn frá Vodafone um loyvi at uppseta fartelefonstøð á Sandvíkar skúla.**

Samtykt varð at geva loyvi til at seta antennuna fasta inni á stykkinum við skúlan, men ikki á sjálvt húsið og annars, at alt skal gerast í samráð við Hvalbiar Kommunu.

**11. Innkomin tilboð uppá alment WC.**

Tveir timburmeistarir vórðu bidnir um at geva inn tilboð, SH-Bygg og Tommy Olsen. Samtykt varð at taka av tilboðnum frá SH Bygg.

Kunnað varð um ymisk mál.

Fundarbókin lisin og skrivað undir.

Fundurin lokin kl. 22.00.